## Nógvir oljupengar

Fyri fyrstu ferð er marknaðarvirðið á norska oljugrunninum farið upp um 800 milliardir norskar krónur. Tað kom fram, tá grunnurin í gjár legði fram roknskapin fyri triðja ársfjórðing.

Hetta er kortini minni, enn norska stjórnin roknaði við fyri tveimum árum síðani. Tá varð roknað við, at marknaðarvirðið á grunninum fór at koma upp á einar 860 milliardir krónur longu seinasta ársskiftið, men vánalig gongd á altjóða virðisbrævamarknaðinum gjørdi, at marknaðarvirðið á grunninum tvørturímóti fall, so tað kom heilt niður á 600 milliardir norskar krónur.

Í seinastuni er gongdin á altjóða virðisbrævamarknaðinum vend, og tí er grunnurin nú góðar 800 milliardir krónur verdur. Den norske Bank, sum umsitur grunnin, væntar, at við verandi gongd fer virðið á oljugrunninum nærri 900 enn 800 milliardum krónum. Tað svarar til góðar 190.000 krónur fyri hvørt fólk í Noregi.

## Sjónvørp hjálpa ófriðarmonnum

Amerikanski verjumálaráðharrin, Donald Rumsfeld, sigur, at amerikanarar hava prógv fyri, at tær báðar arabisku sjónvarpsstøðirnar al-Jazeera og Al-Arabiya arbeiða saman við ófriðarmonnum í Irak.

Ráðharrin vil vera við, at leivdir av stýrinum hjá Saddam Hussein, forseta royna at billa fólki inn, at amerikonsku hermenninir eru ikki førir fyri at steðga ófriðinum í Irak. Hetta verður gjørt ígjøgnum tær báðar sjónvarpsstøðirnar, og hesum hava vit prógv fyri, sigur Rumsfeld við amerikanskar fjølmiðlar. Hann vildi kortini ikki siga, hvat tað eru fyri prógv, sum amerikonsku myndugleikarnir hava.

Irakska stjórnarráðið setti fyri nøkrum døgum síðani Al-Arabiya forboð fyri at senda tíðindi úr Irak. Grundgevingin var, at sjónvarpsstøðin eggjar fólki til at gera uppreistur ímóti stýrinum og hersetingarvaldinum.

## Yvirgangsmaður løgregluovasti

Í Suðurafrika eru fólk á gosi, tí myndugleikarnir hava gjørt av at seta ein fyrrverandi yvirgangsmann í starv sum løgregluovasti.

Robert McBride var í áttatiárunum dømdur fyri at hava verið við til at skipa fyri einari bumbuatsókn at einari matstovu í býnum Durban. Tríggjar kvinnur doyðu í spreingingini, og 71 fólk fingu skaða. Í einari aðrari atsókn, sum Robert McBride eisini var við til at leggja til rættis, doyði ein løgreglumaður. Hann varð dømdur til deyða, men fekk grið og varð latin leysur, tá apartheidstýrið í Suðurafrika fall.

Seinni fekk Robert McBride starv í uttanríkisráðnum, og nú er hann tilnevndur løgregluovasti í býarpartinum East Rand í Johannesburg. Andstøðan sigur tilnevningina vera heilt burturvið, men ANC sigur, at Robert McBride var ikki yvigangsmnaður, men frælsisstríðsmaður. Sjálvur hevur hann alla tíðina sagt, at hann stríddist fyri Nelson Mandela og ANC ímóti hvíta apartheidstýrinum.

## Dømdir fyri landasvik

Fyrradagin vórðu tveir amerikanarar dømdir átjan ára fongsul fyri landasvik, tí teir fyri tveimum árum síðani royndu at sleppa til Afghanistan at berjast ímóti amerikanska herinum har.

Patrice Lumumba Ford og Jeffrey Leon Battle, sum báðir hava tikið við islamskari trúgv, fóru úr USA um heystið í 2001. Tað eydnaðist teimum at sleppa til vestara part av Kina, og haðani ætlaðu teir at fara til Pakistan og síðani til Afghanistan at hjálpa Taliban-stýrinum í bardaganum við amerikanararnar. Í fjør vórðu teir tiknir, eftir at ein maður hjá samveldisløgregluni FBI var komin fram á teir.

Undir rættarmálinum, sum var í statinum Oregon, søgdu teir báðir, at amerikanska rættarverkið kundi ikki døma teir, tí at tann islamska trúgvin stendur oman fyri amerikanska lóg. Men hesum var dómarin als ikki samdur við teimum í. Kona Jeffrey Leon Battle og tríggir aðrir menn eru eisini dømd sek, men sjálv revsingin er ikki ásett enn.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Guantanamo ein vanlukka fyri rættvísið



*Viðferðin, sum fangarnir í Guantanamo fáa, lýkur ikki minstakravið til eina rættvísa rættarviðgerð, sigur bretski dómarin*

**Framferðin ímóti fangunum á amerikonsku herstøðini Guantanamo er ein fullkomin vanlukka fyri rættvísið, sigur tann virdi bretski dómarin Johan Steyn**

FANGAR
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Johan Steyn, sum er ein nógv avhildin dómari í Bretlandi, segði í einari røðu týskvøldið, at amerikonsku myndugleikarnir hava handfarið málið um fangarnar á ein hátt, sum má sigast at vera »ein fullkomin vanlukka fyri rættvísið«, sum hann málbar seg.

Hann segði, at rættvísið, sum myndugleikarnir hava víst fangunum, lýkur á ongan hátt altjóða minstakravið til eina rættvísa rættarviðgerð. Verði eg spurdur um hetta, er svarið eitt rungandi nei, segði Johan Steyn.

-Sum sakførari lærir tú at virða hugsjónirnar í amerikanska demokratinum, men eg má siga, at í hesum førinum er tað fullkomiliga miseydnað, legði tann virdi dómarin afturat.

Fangar úr fleiri londum eru í Guantanamo. Avstralsku myndugleikarnir hava júst gjørt eina avtalu við amerikonsku myndugleikarnar, sum tryggjar, at tveir avstralskir ríkisborgarar, sum eru millum fangarnar, verða ikki dømdir til deyða. Roknað verður við, at Bretland fer atgera eina tilsvarandi avtalu við USA um teir bretsku ríkisborgararnar í fangaleguni.

# Norðmenn vænta innrás úr Eysturevropa

**Tað er ikki óhugsandi, at meiri enn 100.000 eysturevropearar koma á norska arbeiðsmarknaðin tey næstu árini**

ARBEIÐS-MARKNAÐUR
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Tann 1. mai næsta ár koma tey eysturevropeisku londini upp í Evropasamveldið, og tá stendur tað fólki í Eysturevropa frítt at royna eydnuna í tveimum vesturevropeisku londunum. EBS-sáttmálin ger, at hetta fer eisini at umfata Noreg, sjálvt um landið ikki er í ES.

Í einari nýggjari frágreiðing, sum norskir búskaparfrøðingar hava skrivað, stendur, at helst fara ímillum 10.000 og 20.000 eysturevropearar at leita sær til Noregs um árið, eftir at arbeiðsmarknaðurin er latin upp. Higartil hevur arbeiðsmegin ferðast lítið ímillum ES-londini og EBS-londini. Hetta kemst serliga av málsligum trupulleikum, øðrvísi mentan og sterkum familjubondum, siga norsku búskaparfrøðingarnir.

Men teir vænta ikki, at hesi viðurskiftini fara at hava so stóra ávirkan í framtíðini, og kemst tað av tí sera stóra lønarmuninum ímillum Eystur- og Vesturevropa, og harafturat er arbeiðsloysið munandi størri eystanfyri enn vestanfyri. Hesi viðurskifti fara at gera, at nógvir eysturevropearar fara at leita sær vestureftir, og Noreg verður eitt av londunum, sum fólk fara at leita til.

Búskaparfrøðingarnir leggja afturat, at streymurin av eysturevropearum til Noregs fer at leggja ein doyvara á lønarvøksturin í Noregi í komandi árum.

Bilar

Nr. 226 • hósdagur • 26. november 2003 • 77. árg.

Hyundai Tucson:

# Aftur ein nýggjur Hyundai í 2004

**Komandi ár kemur aftur ein nýggjur Hyundai á marknaðin. Talan verður um Tucson, sum er ein minni útgáva av Hyundai Santa Fe. Motorarnir verða 4 syl. bensin og diesel og møguleiki verður eisini fyri einum V6 bensimotori**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Komnadi ár kemur hesin Hyundai Tucson á marknaðin. Designið er smart og avbjóðandi*

Hyundai halda á við at geva bilunum nøvn eftir amerikanskum býum. Tuscon, sum úttalast "tuson" er ein býur í Arizona við umleið 460 túsund íbúgvum.

Hyundai Tucson kemur á koreanska marknaðin annan ársfjórðing í 2004, og sølan til restina av heiminum byrjar í triðja ársfjórðingi.

Frá Hyundai verður sagt, at Tucson skal marknaðarførast sum ein væl útgjørdur kvalitetsbilur til kappingarførar prísir.

Eins og Hyundai Santa Fe kemur Tucson bæði sum forhjólsdrivin og sum 4x4. Motorarnir verða 4 syl. bensin og diesel og møguleiki verður eisini fyri einum V6 bensinmotori.

Málið hjá Hyundai er at hava so nógvar ymiskar bilar, sum kunnu kappast í øllum klassum, tí koma javnan heilt nýggir bilar á marknaðin, sigur Werner Frey, sum er stjóri fyri Hyundai Motor í Evropa.

*Kelda: Hyundai Bil Import A/S*

Ford Transit Connect:

# Ársins vørubilur í Danmark í 2004

**Ford Transit Connect er av donskum motorjournalistum kosin "Årets Varebil i Danmark 2004". Grundgevingarnar vóru t.d. at bilurin er ein ektaður vørubilur við nýhugsan innan innrætting og við nógvum ymiskum møguleikum sum arbeiðsbilur**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Stutt eftir at Ford Transit Connect kom á marknaðin í fjør, bleiv hann kosin "Van og the Year 2003" og bleiv harvið ársins vørubilur í Evropa. Nú, eitt ár seinni, er hann av donskum motorjournalistum kosin "Årets Varebil i Danmark 2004".

Grundgevingarnar vóru at Transit Connect er ein ektaður vørubilur við nýhugsan innan innrætting og við nógvum ymiskum møguleikum sum arbeiðsbilur. Eisini tað at bilurin fæst við styttri og longri aksilfrástøðum og við høgum taki. Bilurin er bygdur upp sum ein rættur vørubilur við einum undirvogni, sum ber vektina sera væl.

Sum standardútgerð er bilurin útgjørdur við t.d. anti-spinn, airbag framman í báðum síðum, sentrallás, el-síðuspeglum við hita og bæði rattið og førarasetrið kunnu stillast allar vegir. Tarnsit Connect fæst við turbodieselmotorum við 75 og 90 hk og einum 1,8 litur bensinmotori við 115 hk.




*Hjá P/F Wensel fegnast teir um at Ford Transit Connect bleiv ársins vørubilur. Á myndini er Jógvan Højgaard, sølumaður*